# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Eg veit ikki, um kríggið í Irak hevur gjørt USA tryggari. Tað havi eg ikki hugsað um*

*(David Petraeus, generalur)*

# Karen Jespersen aftur ráðharri

**Fyrrverandi sosialdemokratiski ráðharrin í almannamálum umsitur nú aftur sama málsøki, men nú sum ráðharri hjá Vinstra**

Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, fer ikki at skriva út fólkatingsval enn á sinni. Tað er greitt aftan á broytingarnar í stjórnini í dag.

Karen Jespersen, sum fór úr sosialdemokratiska flokkinum upp í Vinstra, skal umsita almannamál fyri Evu Kjer Hansen, sum yvirtekur matvørumálini frá Hans Christian Schmidt, sum fer úr stjórnini og væntandi verður formaður í tingbólkinum hjá Vinstra. Samstundis tekur konservativi Jacob Axel Nielsen við sum ráðharri í flutningsmálum eftir floksfelagan Flemming Hansen, sum fer aftur í Fólkatingið.

Politiskir eygleiðarar í Keypmannahavn siga, at Karen Jespersen fer avgjørt at styrkja stjórnina, samstundis sum hon verður ein sterkur mótleikari hjá sínum fyrrverandi andstøðuflokki.



*Karen Jespersen er 60 ára gomul og útbúgvin søgu- og fornfrøðingur*
*(Mynd: Polfoto)*

# Stríð um arvin eftir Pavarotti

**Luciano Pavarotti var ikki meiri enn kølnaður, tá tey avvarðandi fóru at stríðast um arvin**

Stríðið stendur millum tveir partar. Í øðrum partinum eru tær fýra døturnar hjá sangaranum, og í hinum partinum er seinna kona hansara, Nicoletta. Hon er í øðini um, at maður hennara broytti testamenti sítt fyri stuttum, soleiðis at døturnar Lorenza, Cristina, Giuliana og Alice fáa ein uppaftur størri part av arvinum enn í tí upprunaliga testamentinum. Tríggjar tær fyrstu døturnar fekk Pavarotti í sínum fyrra hjúnarlagi, men ta trý ára gomlu Alice fekk hann saman við Nicolettu.

Vinfólk hjá Pavarottihjúnunum siga, at viðurskiftini millum hjúnini bæði kølnaðu nógv teir seinastu mánaðarnar, og tað er helst orsøkin til, at Pavarotti valdi at broyta testamentið í summar.

Italskir fjølmiðlar vilja vera við, at Luciano Pavarotti átti pengar og virði fyri einar 2,5 mia. krónur, nú hann doyði. Millum annað átti hann fleiri íbúðir í New York og í Monte Carlo.



*Luciano Pavarotti var múgvandi maður, og nú er stríð um arvin*

# Bersøgin biskupur leggur frá sær

**Benadikt 16. pávi hevur góðtikið, at erkabiskupurin í Zimbabwe, Pius Ncube, fer frá**

Hóast Pius Ncube er 60 ára gamal, so er tað ikki aldurin, sum hevur fingið hann at biðja um at sleppa úr biskupastarvinum, men harafturímóti eitt mál um ótrúskap.

Pius Ncube hevur í fleiri ár verið sera atfinningarsamur ímóti stýrinum hjá Robert Mugabe, forseta, men í summar prentaðu fleiri almenn bløð í Zimbabwe myndir, sum sambært bløðunum vístu Ncube í songini saman við einari giftari kvinnu.

Viðhaldsfólk hjá biskupinum vísa tíðindunum aftur og siga, at tey eru ikki annað enn ein roynd hjá stýrinum at fáa Ncube at tiga. Hinir biskuparnir í Zimbabwe hava fyrr styðjað Pius Ncube og róst honum, tí hann hevur torað at sett seg upp ímóti Mugabe og stýri hansara.



*Óhepnar myndir fingu Pius Ncube at leggja frá sær*

## STUTT SAGT

### Prestar fingu bók

Fleiri hundrað danskir prestar fingu í gjár hvør sítt eintak av einari stórari bók, sum turkiski muslimurin Adnan Otkar hevur skrivað. Bókin, sum hevur enska heitið "Atlas of Creation", er ein roynd at mótprógva menningarlæruna hjá Charles Darwin. At bókin bleiv borin prestunum júst tann 11. september gjørdi, at onkur prestur fór til løgregluna við bókini, skrivar JydskeVestkysten. Bókin sigst vera sera væl umtókt í arabiskum londum.

### Ebola í Kongo

Altjóða heilsustovnurin WHO váttar nú, at tann herviliga sjúkan ebola er farin at ganga í Demokratiska Lýðveldinum Kongo. Sum skilst hava fleiri fólk har suðuri í landinum fingið sjúkuna, men WHO dugir ikki at siga, um tey eru á lívi enn. Sambært tí, sum WHO hevur fingið at vita úr Demokratiska Lýðveldinum Kongo, hava 300 fólk verið sjúk í Kasailandspartinum har suðuri í landinum, og minst 120 eru deyð teir seinastu mánaðarnar. Tað er kortini ikki vist, at øll eru deyð av ebola, sigur heimsheilsustovnurin.

### Uppsagnir á DR

Í dag hava umleið 60 starvsfólk í Danmarks Radio fingið at vita, at tey hava mist ella fara at missa arbeiðið. Uppsagnirnar eru liður í sparingum, sum hava verið neyðugar, tí nýggju útvarps- og sjónvarpshúsini hjá DR eru vorðin nógv dýrari enn upprunaliga ætlað. Hetta er tað triðja ummsagnarumfarið í ár, og við uppsagnunum í dag eru umleið 160 fólk farin úr starvi í Danmarks Radio. Í øðrum førum fara fólk frá fyri aldur, og fólk, sum arbeiða eftir sáttmála, fáa ikki nýggjan sáttmála, tá tann verandi fer úr gildi.